*Dagf. 22. mai 2015*
*HMR. J. nr. 15/00434*

***Karsten Hansen***
***landsstýrismaður***

***Svar***

***upp á***

**fyrispurning nr. 96/2014 eftir § 52a í tingskipanini um eftirkanningar fyri bróstkrabba frá Jónu Mariusardóttir Mortensen, løgtingskvinnu**

**Spurningurin var soljóðandi:**

1. Nær kunnu kvinnur, ið eru viðgjørdar fyri bróstkrabba og eru í eini skipan, har tær ganga til eftirkanning (kontroll), vænta, at skipanin fer at virka optimalt aftur?
2. Metir landsstýrismaðurin, at skipanin við eftirkanningum fyri bróstkrabba virkar nóg væl? Og um ikki, hvat ætlar landsstýrismaðurin so at gera við tað?

**Svar:**

**Til nr. 1**

Sambært Landssjúkrahúsinum er ein ætlan løgd fyri teir sjúklingar, sum ikki høvdu fingið nýggja tíð, tá ið ein yvirlækni á Medisinska Depli fór frá fyri aldur herfyri. Tær kvinnurnar sum eru komnar stytst í gongdini og tí eru mest átrokandi, hava fingið viðtalutíð fyrst, í meðan tær, sum eru komnar til 6-9 ár, uttan tekin til afturstig (recidiv), og sambært serfrøðini kunnu bíða í 1-1½ mánað, hava fingið fráboðan um hetta, so tær ikki skulu kenna seg ótryggar við bíðitíðina. Hesir sjúklingarnir fáa eina innkalling sendandi við viðtalutíð til eftirkannan í næstum.

**Til nr. 2**

Arbeitt hevur verið við at fáa onkologar frá sjúkrahúsinum í Lund at koma títtari á Landssjúkrahúsið, og er hetta eydnast fyri eitt tíðarskeið í summar og heyst, ið fer at betra um tænastustøðið. Landssjúkrahúsið hevur tó nýliga fingið avtalu í lag við Ríkissjúkrahúsið innan onkologiska økið, og so skjótt hon er sett í verk – eftir ætlan í heyst – verða onkologar á Landssjúkrahúsinum hvørja viku. Avtalan fer at hava við sær munandi betri viðurskiftir fyri føroyskar krabbameinssjúklingar frameftir.

Heilsumálaráðið, 22. mai 2015

**Karsten Hansen**
landsstýrismaður